LM-011/2025

LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Fylgiskjal 10.

Samandráttur

Ummæli frá Familjufyrisitingini

Familjufyrisitingin setir spurnatekin við, um tað bara skal vera ein serligur verji, sum kann søkja um sterilisatión sambært §§ 6 og 7 í uppskotinum, ella um hetta eisini kann vera ein fastur verji sambært § 5 í verjumálslógini.

Til § 6 í uppskotinum vísir Familjufyrisitingin á, at um viðkomandi longu hevur ein verja, kann § 50 í verjumálslógini brúkast til at seta ein serligan verja, um áhugamálini hjá tí sum er undir verjumáli og áhugamálini hjá fasta verjanum eru í andsøgn. Tað vil siga, at tilnevna ein serligan verja sbrt. § 50 er treytað av, at verjumál er sett í verk sambært § 5 í verjumálslógini. Tað ber eisini til at taka avgerð sambært §§ 5 og 50 undir somu viðgerð.

Familjufyrisitingin vísir á, at ómyndug eru nevnd í § 6 og 7 og fleiri staðni í almennu viðmerkingunum, men ikki fólk undir verjumáli. Víst verður á, at fólk undir verjumáli kundu verið nevnd, og at tað í hesum sambandi kundi verið víst til § 24 í verjumálslógini, har tað er ásett, at verjin skal røkja áhugamálini hjá tí, sum er undir verjumáli.

Víst verður á, at persónur, sum verjumál er sett í verk fyri, framhaldandi hevur rætt til samávirkan, og at vejin tískil hevur skyldu til at taka viðkomandi við í týðandi avgerðir sambært § 26 í verjumálslógini. Víðari verður víst á, at uttan mun til, hvussu víttfevnandi eitt verjumál er, kann viðkomandi, sum verjumál er sett í verk fyri, virka frítt persónliga. Tað merkir, at ein verji aldrin kann noyða viðkomandi, sum verjumál er sett í verk fyri at gera eitthvørt ella til at lata vera við at gera eitthvørt.

Gongin 7 • Postrúm 377 • FO-110 Tórshavn
(+298) 35 80 80 • lmr@lmr.fo • www.lmr.fo